Ússaligt og ósakligt av landsstýrismonnum

– Tey, sum hava funnist at ráðstevnuni hjá norðuratlantsbólkinum í Keypmannahavn, eru fólk, sum als ikki vóru til staðar og tað er ógvuliga harmiligt, at sjálvt landsins hægstu menn leypa framav, sigur Høgni Hoydal

RÍKISFELAGSKAPUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað er bæði ússaligt, beklagiligt og ósakligt, at landsins fremstu politikarar leypa framav og finnast at viðurskiftum, teir als onki kenna til.

Føroyski fólkatingslimurin, Høgni Hoydal, kennir als ongar av atfinningunum aftur, sum teir tríggir topp politikararnir í Føroyum, Jóannes Eidesgaard, Bjarni Djurholm og Bárður Nielsen, føra fram ímóti ráðstevnuni, sum var í Keypmannahavn.

– Teir kenna onki til ráðstevnuna, tí teir vóru ikki á henni. Sostatt byggja atfinningarnar á leysartíðindi og misskiljingar og tað er harmiligt, at tríggir landsstýrismenn soleiðis skulu leypa framav, uttan at kunna seg um veruligu viðurskiftini.

Hinvegin vóru grønlendskir politikarar á ráðstevnuni, m.a tríggir landsstýrismenn.

– Og tað var ongin av teimum, sum uppfataðu hetta sum uppilegging um grønlendsk viðurskifti

Høgni Hoydal sigur, at ongin politikari úr Grønlandi ella úr Føroyum vóru við sum fyrilestrarhaldarar.

– Tað vóru bara fýra danskir politikarar, sum hildu fyrilestur. Men teir fýra politikararnir søgdu einki, sum kann elva til stríð, sigur fólkatingsmaðurin.

– Tað, sum teir greiddu frá, var, teirra meting av búskaparliga renslinum ímillum partarnar í ríkisfelagsskapinum.

Hann sigur, at tað hevði verið skeivt at bjóða føroyskum politikarum at hildið fyrilestur, tí so hevði ráðstevnan verið ein politiskari ráðstevnu, og tað var ikki ætlanin

– Men vit vildu fegnir skapa áhuga hjá donskum politikarum fyri blokkinum, sum eitt mál, har tað ikki bara eru danir, sum geva, men har teir eisini fáa nakað afturfyri.

– Og vit vilja fegnir hava danir at avdúka, hvør veruliga ætlanin er við politikki teirra í Norðuratlantshavi.

Tí heldur Høgni Hoydal eisini, at tað var heilt natúrligt at hava ráðstevnuna í Keypmannahavn.

– Hetta var ætlað at vera ein ráðstevna, sum skuldi lýsa nøkur faklig, óheft sjónarmið. Har vóru serfrøðingar, sum hildu, at blokkstuðulin var skaðiligur, men har vóru eisini serfrøðingar, sum hildu, at blokkstuðulin skuldi verið størri og sum mælti til, at tættari samband í ríkinum.

– Atfinningarnar frá landsins hægstu monnum ímóti ráðsevnuni hjá norðuratlantsbólkinum eru burtur úr vón og viti, sigur Høgni Hoydal

Somuleiðis varð tosað um trygdarpolitikk á ráðstevnuni.

Men høvuðsevnið á ráðstevnuni var peningarenslið ímillum Føroyar og Danmark og ímillum Grønland og Danmark.

– Í so máta var talan um eina sera væleydnaða ráðstevnu, tí fyrilestrahaldararnir komu eisini inn á, hvat Danmark fær burturúr ríkisfelagsskapinum.

– Serliga tí vit fingu reist spurningin um, hvat tað er, sum danir betala fyri. Um teir betala fyri at varðveita yvirveldina yvir norðuratlantshavinum, ella um teir betala fyri teir stórpolitisku fyrimunirnar, teir hava havt av ríkisfelagsskapinum.

Onki við ráðstevnuna at gera

Høgni Hoydal sigur, at tað, sum síðani hevur verið til umroðu, eru onkrar greinar í Berlingske Tidende.

– Millum annað hava vit lisið álop á formannin í búskaparráðnum fyri at hann skal hava úttalað seg um frádráttin hjá fiskimonnum. Men hetta hevur onki hald í veruleikanum, tí hann tók ikki frádráttin upp á tungu.

Høgni Hoydal sigur, at hvørki teir føroysku, ella teir donsku politikararnir sum aftan á hava úttalað seg um ráðstevnuna, vóru til staðar, so tað hevur onki við ráðstevnuna at gera.

– Yvirhøvur kenni eg onki aftur av tí, sum nú verður funnist at ráðstevnuni fyri.

Høgni Hoydal tekur heldur ikki atfinningarnar at sær um tað, at hann skal hava dragsa føroyskan politikk niður til Danmarkar.

– Hvussu kann óheft upplýsing vera landsskaðilig, spyr hann. Vit hava sanniliga viðgjørt blokkstuðulin heima í Føroyum. Men hetta er ein veiting, sum danir lata okkum hvørt ár og tað kann ongantíð vera til nakran sum helst skaða at upplýsa um viðurskiftini.

– Sostatt fingu vit eisini sett ljóskastarin á tey viðurskifti, at blokkstuðulin er ikki bara peningur, sum danir betala, uttan at fáa nakað afturfyri og tað er avgjørt gagnligt.

Eitt nú var víst á, tann týdning, sum Føroyar og Grønland høvdu undir kalda krígnum. Men tað var ongin danskur politikari, sum leyp upp frá fyri tað.

Høgni Hoydal sigur, at sjálvsagt skulu hesi viðurskiftini viðgerast bæði í Føroyum og í Danmark og hvar tað skal vera, so at vit ikki einaferð aftur verða tikin við buksunum niðri, sum vit vórðu tað í kreppuni.

Burtur úr vón og viti

Høgni Hoydal sigur, at tær atfinningar, sum hava verið ímóti ráðstevnuni, eru tær vanligu útspillingarnar, sum eru í føroyska samfelagnum.

– Hvørja ferð onkur tekur eitt mál upp, sum onkrum øðrum ikki dámar, verður farið eftir manninum við útspillingum í royndini eftir at sáa iva um málið, heldur enn at fara eftir sakini. Í hesum føri verður tað gjørt við at leggja teimum, sum vóru á ráðstevnuni, orð í munnin, sum teir ikki hava sagt.

– Upplýsing kann aldrin vera hættislig. Tað er beinleiðis ódemokratisk hugsan at siga at upplýsing er skaðilig.

Høgni Hoydal heldur eisini, at tað er beinleiðis tvætl, tá ið sagt verður, at ráðstevnan er við til at máa støðið undan avtaluni frá 1998 um at ábyrgdin fyri føroyskum figgjarpolitikki, liggur hjá landsstýrinum.

– Á Fólkatingi hava føroyskir fólkatingslimir altíð tosað um blokkstuðul og um at varðveita ríkisfelagsskapin. Men nú, teir ikki eru á fólkatingi longur, ætla teir forða øðrum í at gera tað sama og at upplýsa. Tað er burtur úr vón og viti, sigur Høgni Hoydal.

Nú, vit tosa um blokkin, ert tú endurgivin fyri at siga, at tú helt at í sambandi við føroyskt fullveldi, helst tú, at ein skiftistíð upp á 6-8 ár var hóskandi.

– Ja, men tað hevði heldur onki við ráðstevnuna at gera. Eg eri spurdur um tað aftaná og har greiddi eg frá tjóðveldisfloksins støðu. At vit so mæltu til 12-15 ár, tá ið vit vóru í landsstýrinum var tí, at tað var ein politisk neyðsemja, sum samgongan kundi semjast um.

Ongin øsing

Høgni Hoydal vil sostatt heldur ikki kennast við skuldsetingina um, at einasta endamálið við ráðstevnuni var at skapa øsing í Danmark ímóti Føroyum.

– Tað er so langt úti, at tað sigur meiri um teir, sum bera slíkt fram enn um sakina.

– Allar slíkar skuldsetingar byggja á hvørvissjónir frá fólki, sum ikki vóru til staðar og sum tískil ikki vita, hvat tey tosa um.

Hann heldur eisini, at tann øsingin, ið summi stúra skal taka seg upp í Danmark ímóti føroyingum, er er alt ov nógv avgjørd.

– Øsingin er ímillum nakað og onki. Tað er altíð so, at tá ið føroysk mál eru til viðgerðar, er okkurt nos, men tað hæsar avaftur og tað er als onki rok um hetta í Danmark.

– Tað einasta, sum øsir danir, eru tær ræðumyndir, sum viðhvørt vera skaptar um føroyingar sum ábyrgdarleys oyðilond. Men slíkt stingur seg altíð upp við millumbilum. Men tað er eisini júst hetta, vit vilja forða fyri við at útvega vitan og upplýsing, sigur Høgni Hoydal.

– Tí stúri eg als ikki fyri, at ráðstevnan fer at elva til øsing ímóti Føroyum. Tað er heldur tvørturímóti, tí nú eftir ráðstevnuna vita tey, ið vóru til staðar, nógv meiri um veruligu støðuna, sigur Høgni Hoydal.

Hesar vóru atfinningarnar

Í Sosialinum í gjár funnust tríggir av okkara fremstu politikarum at ráðstevnuni, sum norðuratlantsbólkurin skipaði fyri í Keypmannahavn herfyri.

Talan var um Jóannes Eidesgaa, løgmann, Bjarna Djurholm, varaløgmann og Bárð Nielsen, landsstýrismann í figgjarmálum

Í stuttum kunnu atfinningarnar gerast soleiðis upp:

1: Ráðstevnan var beinleiðis landsskaðilig, talan var um at draga innanhýsis, føroysk viðurskifti niður til Danmarkar til viðgerðar og tað er átaluvert, tí føroysk viðurskifti skulu viðgerast í Føroyum og ikki í Danmark.
2: Við hesum tiltakinum tekur norðuratlantsbólkurin grundarlagið undan avtaluni frá 10. juni, 1998 ímillum Føroyar og Danmark. Hendan avtalan staðfestir, at ábyrgdin fyri figgjarpolitikkinum í Føroyum liggur hjá Føroya Landsstýri.
3: Einasta endamálið við ráðstevnuni er at øsa danir upp ímóti føroyingum fyri at fáa politiskan vinning burturúr til tjóðveldisflokkin. Tað var spenta støðan ímillum Føroyar og Danmark í kreppuárunum, sum bjargaði tjóðveldisflokkinum í kreppuárunum, men hesi seinastu árini hevur verið ov friðarligt. Tí reoynir flokkurin nú at skapa ein nýggjan front ímillum Føroyingar og danir
4: Danskir politikarar vórðu bodnir at halda fyrilestur, men ongin føroyskur poitikari varð boðin við

Familjufyritøkan trýr á treysta leikin

Seinastu vikurnar hava sterku vinnulívsfamiljurnar, Restorff og Mohr, veittra sínum lívsverki farvæl. Skulu vit trúgva rákinum úti í heimi, er tað ikki ómøguligt, at somu familjur aftur setast á Hotel Hafnia og Skipasmiðjuna um nøkur ár

FAMILJUFYRITØKUR
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Seinastu vikurnar hava sterku vinnulívsfamiljurnar, Restorff og Mohr, veittra sínum lívsverki farvæl. Skulu vit trúgva rákinum úti í heimi, er tað ikki ómøguligt, at familjurnar aftur setast á Hotel Hafnia og Skipasmiðjuna um nøkur ár

Mohr og Restorff. Tvær siðbundnar vinnulívsfamiljur, ið seinastu vikurnar hava gjørt av at selja síni virki, sum familjan stovnsetti, og síðani hevur stríðst og strevast fyri í ein mansaldur.

Fyri nøkrum vikum síðan kunngjørdu M.C. og Johan Restorff, at Hotel Hafnia, sum pápi teirra, Christian Restorff, setti á stovn í 1951, er lýst til sølu. Í farnu viku kunngjørdi ein onnur sterk vinnulívsfamilja í Havn, Mohrarnir, at teir selja Tórshavnar Skipasmiðju, sum Kjartan Mohr byrjaði í 1936.

Grundgevingarnar fyri søluni hjá báðum familjufyritøkunum vóru rættiliga ymiskar. M.C. Restorff ynskti ikki longur at halda fram á Hotel Hafnia, og tá Johan ikki setti seg føran fyri at keypa bróðurin úr fyritøkuni, avráddu teir at lýsa familjufyritøkuna til sølu.

Á tíðindafundi fríggjadagin segði Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, at globaliseringin hevur økt munandi um kappingina á skipasmiðjumarknaðinum seinnu árini, og skuldi fyritøkan menna seg, var neyðugt við nýggjum íblástri. Neyðugi íblástrurin varð mettur at koma frá framtaksfelagnum NOTIO, og tí gjørdu Mohrarnir av at selja sterku familjufyritøkuna.

Í kjalarvørrinum av hendingunum í føroyska vinnulívinum, har tvær sterkar familjufyritøkur hava valt at veittra teirra lívsverkum farvæl, hava vit valt at hyggja nærri at hugtakinum familjufyritøkur. Hvat er styrkin og vansarnir við familjufyritøkum sammett við aðrar fyritøkur? Ber til at staðfesta, at tríðja ættarliðið vanliga koyrir familjufyritøkuna á heysin, og hvat rørir seg út í heimi við familjufyritøkunum?

Fyri at svara hesum spurningum hava vit tosa við Peer Hull Kristensen, professara í vinnulívssosiologi á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Ymiskir leikir

Eins og í Føroyum hava danir eisini eina sterka siðvenju við familjufyritøkum í danska vinnulívinum. Mærsk, Danfoss, Grundfoss og LEGO eru millum størstu og best riknu fyritøkurnar í Danmark, og tær eru allar upprunaliga familjufyritøkur.

Professarin í vinnulívssosiologi greiðir frá, at tað eru grundleggjandi munir á, hvussu ein fyritøka, ið virkar fritt á einum virðisbrævamarknaði og ein familjufyritøka verður rikin.

– Talan er um tveir grundleggjandi ymiskar leikir. Familjan hevur vanliga betri møguleika at seta langtíðarætlanir út í kortið, tí eigaraviðurskiftini eru í tryggum hondum. Multinationalar fyritøkur hava eigararnar, ið seta høg krøv til vinning her og nú, og tí hava teir torførari at arbeiða við langtíðarætlanum, enn familjufyritøkan hevur, sigur Peer Hull Kristensen.

– Familjufyritøkan trýr á treysta leikin, og tí er vandin fyri einum figgjarligum skrædli ofta minni enn hjá spekulativu multinationalu fyritøkununum. Multinationalar fyritøkur satsa ofta væl meir, og tá er óttin fyri tapi eisini størri. Hinvegin er møguleikin fyri einum peningaligum háli størri enn hjá familjufyritøkuni, sum vanliga altíð dúvar upp á trygga leikin. Hvør stategi er betur, er ein spurningur um raðfesting og trúgv, vísir vinnulívssosiologurin á.

Øðrvísi tryst

Peer Hull Kristensen greiðir frá, at trýstið á eigarunum á einari multinationalari fyritøku og eini familjufyritøku, har eigaraviðurskiftini eru í tryggari legu, kann ikki samanberast.

– Leiðslan á eini multinationalari fyritøkuni skal alla tíð vísa úrslit og vinning fyri eigaranum, tí annars rýma teir til onkra aðra meir áhugaverda fyritøku. Óttin fyri spekulatión og figgindaligum yvirtøkum á altjóða marknaðinum nýtast støðugu familjufyritøkurnar ikki at bera ótta fyri, vísir danski professarin á.

Í Danmark hava kortini fleiri familjufyritøkur gjørt vart við aðrar trupulleikar, ið multinationalu fyritøkurnar ikki nýtast at hugsa stórvegis um.

– Leiðslan í Danfoss hevur fleiri ferðir fýlst á trupulleikarnar við at útvega sær vágafúsan kapital. Familjan, ið eigur meginpartin av Danfoss, hevur ikki somu møguleikar at útvega kapital til íløgur og endurnýgging , sum aðrar peningasterkar multinationalar fyritøkur. Leiðslan á Danfoss hevur tí sagt í donskum fjølmiðlum, at fyritøkan hevur ómetaliga torført við at fylgja við í kappingini á alheimsmarknaðinum, greiðir Peer Hull Kristensen frá.

Bert søga

– Tað er altíð tríðja ættarliðið, sum ger av við familjufyritøkurnar.

Henda søga er javnan at hoyra í vinnulívsheiminum. Vanliga verður tosað um, at abbabørnini at stovnsetaranum av fyritøkunum hava torført við at semjast, og ymisku áhugamálini hjá abbabørnunum ger, at tey hava torført við at standa saman um fyritøkuna, sum familjan hevur rikið í ein mansaldur. Úrslitið gerst, at fyritøkan fer á heysin, og ávirkanin hjá familjuni hvørvur við eitt høgg.

Í Føroyum eru dømi um somu søgur. Handilsvirkið hja SP. Petersen, P/P Wenzel Petersen og bryggariið hjá Restorff fóru øll á heysin, eftir at tríðja ættarliðið í familjuni tók við leiðsluni í fyritøkuni.

– Hatta hoyrir tú ofta, men spurningurin er, hvussu nógv er í tí. Einki vísindaligt prógv er fyri, at tríðja ættarliðið koyrir familjufyritøkur um koll. Eg haldi tí, at hatta uppáhald er nærmari ein myta enn veruleiki, fortelur Peer Hull Kristensen,

Hann greiðir eisini frá, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu familjufyritøkur velja at beina næsta ættarlið inn í familjufyritøkuna.

– Ofta hoyrir tú fólk siga, at sonurin, ið hevur tikið yvir frá pápanum, er komin til skorin klæðir. Hann er ein ríkmannasonur, sum ótarnaður sleppur at taka sær av løttum, hóast hann ongantíð hevur stríðst fyri stjórasessinum. Í summum førum er nakað um hesar søgur, men kortini veit eg um fleiri dømi úr Jútlandi, har eg eri ættaður, at stjóra-synirnar ikki sleppa fram at, fyrr enn teir veruliga hava prógvað sítt virði, greiðir danski proffessarin frá.

Keypa aftur

Peer Hull Kristensen hevur í fleiri ár granskað fyritøkur, og hann fylgir væl við, hvat rørir seg í heiminum. Spurdur, um hvat rørir seg innan hugtakið familjufyritøkur, vísir á hann á eitt áhugavert rák.

– Í kjalarvørrinum av stóru trupulleikunum á virðisbrævamarknaðinum fyri nøkrum árum síðan hevur eitt nýtt rák tikið seg upp. Meðan fleiri familjur valdu at selja sínar fyritøkur fyri 5-10 árum síðan til sterkar multinationalar fyritøkur, vendir rákið nú hinvegin. Eg kenni til fleiri dømi, har familjurnar eru farnar undir at keypa somu fyritøkur aftur, sum tær seldu fyri nøkrum árum síðan. Hetta er eitt rættiliga áhugavert rák, greiðir hann frá.

Um hetta rák kemur á okkara leiðir er ilt at spáa um, men hvør veit, kanska koma Mohrarnar og familjan Restorff undan kavi um nøkur ár og setast aftur á Tórshavnar Skipasmiðju og Hotel Hafnia?